Sum oftast fór hon út at vitja fólk, ella onkur kom at vitja hana.

Nálirnar høvdu eisini frí sunnudagar, og tað dámdi teimum væl. Tær lógu har í vindeygakarminum og fylgdu við øllum tí, sum hendi uttanfyri. Fólk komu framvið við barnavognum og pápum og abbum. Um sólin skein, og tað gjørdi hon fyri tað mesta sunnudagar, hendi eisini, at onkur langabbi var at síggja. Ja, alt, sum kundi ganga og grulva fór út at spankulera. Tey flestu gingu bara framvið vindeyganum, men onkuntíð vóru nálirnar so hepnar, at tey steðgaðu á beint uttanfyri. So hoyrdu tær, hvussu tey fortaldu hvørjum øðrum, hvussu gott veðrið var, og at nú var terri. Hvat terri var, vistu tær ikki, men okkurt gott mundi tað vera, tí fólkini vóru so væl nøgd, tá talan var um terra – tað sást á andlitsbráðnum.

Soleiðis gekk lívið og alt tóktist gott.

Men ein dagin hendi nakað. Tað var um døgurðatíð. Telefonin ringdi, og konan tók hana og segði hallo! So sást, at hon gjørdist glað. Hon flenti og græt alt í senn, men tað vóru gleðistár, tað var so týðiligt. Ja, ja og jú, jú og á dú, segði hon. Tillukku tillukku, ein didda – á, sum eg eri glað! Hon prátaði leingi um longd og vekt og hárlit og "hvørjum líkist hon"?

Tað vísti seg, at hon var blivin omma at eini ommudóttir. Men hetta hendi uttanlands, so um konan vildi síggja hetta lítla undurið, mátti hon avstað við flogfari og flúgva í nógvar tímar.

Nálirnar hoyrdu alt, og tær gleddust við konuni, sum hevði verið so góð við tær. Nakrir dagar gingu, so fór konan at pakka kuffert. Hon fylti kuffertið so fult, at hon mátti seta seg á tað fyri at fáa tað aftur. Nálirnar grunaðu onki ilt, men so fór konan at práta við seg sjálva. "Eg átti at givið ommudóttrini ein pakka við nálum. Tað er gott hjá eini gentu at eiga sær nakrar nálir. Nei, nú eri eg býtt, tað er eitt sindur tíðliga, tá hon bara er 4 dagar gomul. Men nú veit eg, eg gevi henni aðra nálina hjá mær, bara soleiðis til stuttleikar. Eg kundi hongt hana í eina fína ketu og kanska enntá klætt hana við silvuri. Ja, tað geri eg. Nú eru bara tvær eftiri. Eg fekk tíggju frá ommu míni, so best er at geva lítlu ta einu nú, áðrenn ongin er eftir. Ein nál er nokk til mín. Eg seymi og stoppi ikki so nógv longur, nú so sterkt tógv er at fáa til skóleistar. Tað er næstan ógjørligt at slíta hol á teir."

Sum sagt so gjørt. Konan tóka aðra nálina úr vindeygakarminum og setti hana fasta í eitt petti av køksrullu og so niður í ein lumma í hondtaskuni.

Sjokk, sjokk! Nálin í vindeygakarminum sá stjørnur og mánar fyri eyganum og so svímaði hon.

Táið nálin vaknaði aftur, var so undarliga stilt í húsinum. Uttanfyri regnaði og stormaði og inni var kalt og hálvmyrkt. Bara gøtulyktin uttanfyri kastaði nakrar glæmur eftir gólvinum og upp á bróstið. Ein vindharpa sum hekk í vindeyganum sendi klænar tónar út í rúmið, meðan hon svingaði aftur og fram í gjóstrinum. Nálin skultraði sær og royndi at minnast, hvat tað var, sum gjørdi hana so fjálturstungna. Tað sveið í eyganum, men ikki var tað av nakrari rullupylsu. Nei, tað var saltið í tárunum, sum hon hevði grátið í vitloysinum.

Hon ætlaði sær júst at siga okkurt við hina nálina, tá hon mintist, hvat ið hent var. Hon gjørdist so kedd og forharmað, at hon ynskti seg burtur aftur í óvit. Fyri fyrstu ferð var hon ill við gomlu konuna og helt hana vera býtta, ja, so skítibýtta. Hvat hugsaði hon fyri sær – at fara burtur í onnur lond og lata seg, trúgvastu nál í landinum, liggja einsamalla eftir?

Tað var eitt syndarligt skil hjá nálini. Hon visti ikki síni livandi ráð, so hon varð bara liggjandi og royndi at sova sum mest.

Hon droymdi um ungdómsins vár, tá nálirnar vóru tíggju í tali. Tá var gleði og gaman. Tær kappaðust um at sleppa framat at seyma. Og tær skiftust um, júst sum rættir vinir eiga at gera. Men tá rullupylsutíðin kom, var ongin kapping. Satt at



siga, so royndu tær, hvør í sínum lagi, at látast at sova, tá konan kom at velja sær eina teirra at seyma pylsuna við øllum leykinum og piparinum og saltinum ikki at forgloyma.

Men morgunin eftir, tá tann óhepna nálin kom aftur til hinar, var hon so skínandi blonk og nývaskað, at tær næstan blivu øvundsjúkar. Men sjálvandi lótu tær sum einki, tí tað er ikki pent at vera øvundsjúkur, tað vistu tær væl. Og teirra túrur kom eina aðru ferð. Tað var bara at hava tol.

Men tá næsta rullupylsutíðin kom, høvdu tær gloymt alt um, hvussu vælnøgd pylsunálin sá út, tá hon kom aftur beint úr tí flógva sápuvatninum. Bara leykur og pipar og salt ikki at forgloyma var í huganum á teimum, so tær royndu aftur at sleppa sær undan. Men tá tær so aftur sóu, hvussu tann kosna nálin strálaði, mintust tær og iðraðu seg. Leykurin og piparið og saltið ikki at forgloyma sveið illa, men baðið um morgunin var so ediligt, at tað var sviðan vert.

Tíðin gekk og eftir tíggju ár, høvdu tær allar prøvað sviðan og gleðina, og soleiðis eldust tær og gjørdust gamlar og klókar. Eisini tær, sum hvurvu so við og við, tí onki hvørvur, tað fer bara okkurt annað stað at vera.

Men nú mugu vit heldur fara aftur til ta neyðars einsamøllu nálina í vindeygakarminum.

Tá hon hevði ligið har og start og stúrt í fjúrtan langar dagar og enn longri nætur, hendi nakað óhugnaligt. Tað var á miðju nátt, og veðrið var av tí ringasta. Gøtulyktin uttanfyri var slóknað, tí onkrir smádreingir høvdu skotið til máls eftir peruni, so hon ikki bara brast, men brotnaði í smápetti, sum duttu niður á gongubreytina og søgdu "pling – pling".

Tá mundi nálin mist ta allarsídsta av tí sindri av móti, hon hevði eftir. Gøtulyktin var hennara einasta troyst í myrkrinum, og nú var bøðlamyrkt. Men tá hon hevði vant seg við myrkrið, sá hon tó so nøkulunda.

Júst tá nálin ætlaði sær at leggja seg at sova, sá hon ein stóran skugga uttanfyri. Skuggin fór aftur og fram, og so, alt í einum steðgaði hann, og andlitið av einum skepilsi hugdi inn í stovuna. Hetta var ein stórur og tjúkkur maður. Hann helt hendurnar uppi yvir eygunum og skimaðist inn. So tendraði hann eina lummalykt og lýsti runt í stovuni. Nálin gjørdist lívsforskrekt, tí fyri henni tóktist tað, sum maðurin hugdi beint inn í eygað á henni.

> Tíbetur sløkti hann lyktina skjótt aftur og hvarv. Men fáar minuttir seinni hoyrdi nálin onkran fanglast við låsið í úthurðini. Til alla lukku var úthurðin stongd, men til alla ólukku hevði úthurðin ein stóran rút, og alt í einum hoyrdist ljóðið av brotnandi glasi. Og tað segði ikki bara "pling – pling" sum peran í lyktapelanum. Tað segði "plunk – plønk – plonk og krasj", og samstundis kom ein hvirla av teimum harðastu inn gjøgnum úthurðina, sum maðurin hevði latið upp. Hvirlan fór – ja, sum ein hvirla inn í stovuna, so gardinurnar lyftust upp og tóku í tveir urtapottar, sum síðan skramblaðu á gólv. Maðurin bannaði fyri seg sjálvan og kom so trampandi inn í stovuna, har nálin lá sum negld í vindeygakarminum. Hann tendraði lummalyktina og gekk runt og hugdi at øllum, sum inni var.

> Tá sá nálin, at hann hevði eina stóra, svarta tasku í hondini. Hon sá eisini, at hann var ikki bara stórur og tjúkkur men eisini skitin og órakaður. Hann var í runutum gummistyvlum og eini holutari troyggju. Hárið stóð í allar ættir og hann luktaði illa. Ja, hann stinkaði.

Nálin visti ikki, hvat í allari víðu verð, hon skuldi gera. Hon hugsaði við sær sjálvari, at nú er endin komin fyri meg, og hon ynskti seg aftur til rullipylsurnar. Heldur hevði hon viljað seymað hundrað rullipylsur uttan tað deiliga baðið aftaná, enn at koma í klørnar á hesum røvaranum. Tí ein røvari var hann. Ein røvaratjóvur, sum ætlaði sær at stjala frá tí fittu, gomlu konuni.

Tá nálin fór at hugsa um konuna, mundi hon farið at grátið. Hon gloymdi alt um, hvussu ill hon hevði verið inn á hana. Nú mintist hon bara tað góða, konan hevði gjørt. Hon fyrigav henni, at hon var farin avstað við hinari nálini. Tað var ikki so løgið, at ein omma vildi geva ommudóttrini eina nál. Ein genta mátti eiga eina nál. Nálin fór so langt inn í hugaheimin, at hon næstan hevði gloymt røvaran.

Tá hon raknaði við aftur, sá hon, at hann hevði stappað alt møguligt í taskuna. Hann hevði verið í hvørjari skuffu



▶